# Familjudagur hjá Ættleiðingafelagnum

**Ættleiðingafelagið skipar fyri familjudegi á Argja skúla leygardagin 9. apríl**

ÆTTLEIÐINGARDAGUR
*Tíðindaskriv*

Tað er júst eitt ár síðani at stovnandi aðalfundur hjá felagnum varð hildin. Hesin dagurin var sera væl eydnaður og ætlanin er hesa ferð at gera enn meiri burturúr, at hetta skal vera ein dagur fyri familjuna.

Á degnum verður eisini ein løta, har felagið heldur aðalfund og tá verður skipað fyri undirhaldi fyri børnunum. Skráin fyri aðalfundin er at lesa á heimasíðu felagsins.

Argja skúli er eitt spennandi stað til eitt tílíkt tiltak, tí møguleiki er fyri, at børnini kunnu svimja. Aftaná at fólk eru komin, og hava fingið morgundrekka er ætlanin at fara at svimja. Tað er eisini gott pláss at spæla og rokast í fimleikahøllini og uttanfyri – um veðri er til vildar.

Á middegi er ætlanin at borðreiða við rættum frá teimum ymsu londunum, sum tey ættleiddu koma frá. Familjurnar skulu hvør taka ein rætt við og fer nevndin at samskipað hetta. Tað er tó ikki nakað krav, at tað skal verða ein eksotiskur rættur.

Tað er eingin treyt at verða limur í felagnum, men øll sum hava áhuga, kunnu gerast limir. Tey, sum umhugsa at ættleiða, er eisini hjartaliga vælkomin.

Fleiri upplýsingar fáast á heimasíðuni hjá felagnum: www.aettleiding.fo

# Jacob til Føroya

**Jacob Andersen kemur aftur á ferð til Føroya í mai. Hvørt Guðrun Sólja Jacobsen og Jacob fara saman á pall siga søgur onki um, men hvør sær hava tey úr at gera. Tann 2. apríl er Guðrun í Parkini í Keypmannahavn**




*Jacob Andersen kemur aftur til Føroya í mai. Tá hann seinast vitjaði, vóru hann og Guðrun á konsertferð saman, men hvørt tað verður soleiðis hesaferð, siga søgurnar onki um. Myndin er frá fyrstu vitjan hansara; Jacob og Guðrun á palli í Trongisvági*

*Mynd: D.Olsen*

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Jacob Andersen gjørdist endaligi vinnarin av kappingini Stjørna eitt Kvøld, tá stóru stjørnurnar kappaðust um hetta heiðurspláss.

Hann hevur vitjað í Føroyum áður, og nú liggur leiðin aftur til Føroya. Í mai fer hann á pall í Fuglafirði og á Tvøroyri.

Jacob hevur júst ferðast á konsertferð við kenda John Fogerty, har hann hevur verið upphitari. Ein uppliving og møguleiki, sum Jacob ikki var seinur at taka av.

Men nú er hann aftur á heimligari leiðum, spælir í Danmark, og um ein mánað ella so, stendur hási danin á føroyskari grund.

## Guðrun í Parkini

Tá Jacob seinast vitjaði í Føroyum, var tað saman við Guðruni Sólju Jacobsen, sum eisini hevur úr at gera eftir stjørnukappingarnar, har hon eisini gjørdist vinnari.

Hóast søgur hava verið um hesa samansetingina enn einaferð, so sigur Guðrun seg onki vita um, at tey skulu saman á pall, men hon veit, at Jacob kemur til Føroya í mai.

Guðrun hevur eisini úr at gera. Tann 2. apríl verður hon í Parkini í Keypmannahavn í samband við eitt H.C. Andersen tiltak.

– Og har verður Jacob eisini við, sigur Guðrun.

2. páskadag fara Guðrun og Showmenn at spæla til stuðulstiltak hjá Havnar Hornorkestri og í næstum eru eisini allir festivalarnir í Danmark, millum annað nærkast SommerRock. Guðrun luttekur á fleiri av hesum.

Guðrun hevur ætlanir um fleiri framførslur við Showmonnum í Føroyum. Millum annað vil hon fegin spæla í Suðuroynni, og tað eydnaðist ikki í hesum umfarinum, sum tey nú hava verið saman á ferð.

Men konsertirnar við Guðruni og Showmonnum mugu bíða til seinni í summar, tí øll hava tey ymiskt á skránni í hesum døgum, so illa passar saman hjá teimum.

Men Jacob Andersen síggja og hoyra vit í mai, og eisini Guðruna Sólju hoyra vit av og á komandi mánairnar, fyrst 2. páskadag til stuðulstiltakið í Havn hjá Havnar Hornorkestri.

# Útbúgving sum demenssamskipari

**Nú verður aftur møguleiki at taka diplomútbúgving sum demenssamskipari í Føroyum**



*Tórshavnar Kommuna fer nú undir at útbúgva næsta liðið av demenssamskiparum*

ÚTBÚGVING
*tíðindaskriv*

Fyri at stuðla undir, at borgarar við sjúkuni demens fáa eitt virðiligt lív, hevur Tórshavnar kommunan avgjørt at skipa fyri útbúgvingini sum demenssamskipari.

Í februar 2004 tóku 18 føroyingar prógv sum demenssamskiparar. Tað var Alzheimerfelagið, sum tók stig til og stóð fyri fyrstu útbúgvingini av hesum slagnum, sum varð hildin í Føroyum.

Í ár verður so farið undir at útbúgva eitt lið afturat. Hesaferð verður tað Tórshavnar kommuna, sum fer at standa fyri útbúgvingini. Tórshavnar kommuna ásannar stóra tørvin á at fáa útbúgvið fólk til hetta økið, tí fleiri tilboð eru komin í kommununi til fólk við sjúkuni demens. Eitt nú fer Heimið fyri minnisveik í Vallalíð at lata upp í ár.

Skeiðið verður tó ikki bert fyri starvsfólk í Tórshavnar kommunu. Møguleiki verður eisini hjá fólki kring landið at søkja um upptøku.

Eins og í fjør verða tað skeiðsleiðarar frá Omsorgsorganisationernes Samråd í Danmark, sum fara at undirvísa.

Endamálið við at skipa fyri tílíkari útbúgving er, at kommunan kann stuðla undir, at borgarar við sjúkuni demens fáa eitt virðiligt lív, og at teirra avvarðandi kunnu fáa stuðul, vegleiðing og kunning um sjúkuna.

## Útbúgving neyðug

Tað er ein sannroynd, at umhvørvið hevur nógv at siga, tá ið talan er um trivnaðin hjá fólki við sjúkuni demens. Tey skulu hava serligar umstøður, og tað krevst av starvsfólkunum, at tey hava innlit í sjúkuna. Tí er útbúgving av starvsfólki sera neyðug. Við at útbúgva starvsfólkini verður góðskan á røktini betri.

Tann sjúkurakti varðveitir førleikan longri, trívist betri, atferðartrupulleikar minka, og nýtslan av sissandi heilivági verður minni. Samskiftið millum tann sjúkurakta og starvsfólkið verður betri, og nøgdsemi í arbeiðinum batnar.

Endamálið við útbúgvingini er at útbúgva fólk, sum kunnu:

- leggja til rættis frálæru og vegleiða starvsfelagum og øðrum
- koma við hugskotum, leggja til rættis menningarætlanir og seta tær í verk
- samskipa arbeiðsorkuna, tá ið tað snýr seg um viðgerðar- og røktarspurningar
- vera lyklapersónar í tvørfakligum samstarvi á demensøkinum.

Skeiðið er í trimum modulum. Fyrsta modul verður í juni, eitt í august og eitt í desember. Kunning um skeiðið, tilmelding o.a. er at finna aðrastaðir í blaðnum.